

kanst tú ikki roykja. Og tá tað eru fá av teimum eldru sum roykja, so eru tað heldur ongar fyrimyndir av roykjarum, staðfestir Ólavur Winther.

## Vilja markera bragdið

At eingin av teimum 67 næmingunum í 8.-,9.- og 10. flokki roykir er ikki mest skúlanum at takka. Hinvegin eru tað næmingarnir sjálvir, ið eiga rós uppiborið.

- Tú kann gera tað so tvørligt sum møguligt at roykja, men í síðsta enda er tað jú næmingurin sjálvur, sum tekur avgerðina, sigur Ólavur Winther.

Tá tað eru næmingarnir, sum eru so raskir, at eingin teirra roykir, vil skúlin eisini markera tað onkursvegna.

- Vit hava tosað saman um tað, og hava eisini verið í samband við mentanarnevndina í Vestmanna Kommunu, um tey kunnu stuðla tí. Vit ætla, móti endanum á skúlaárinum, og um eingin av næmingunum fer at roykja, at gera nakað burturúr hesum og markera tað við møguliga eini plátu, sum verður hongd upp í skúlanum, og har tað kemur at standa at framhaldsdeildin í Vestmanna var roykfrí í skúlaárinum 2008/2009, sigur Ólavur Winther.

Eftir ætlan verður hesin árgangurin heiðraður fyri at vera tann fyrsti roykfríi í skúlanum, og vil væl við, verða fleiri árgangir eftir eisini heiðraðir.